AR8

Umsóknarblað

ÚTLENDINGASTOVAN

IMMIGRATION OFFICE

AR8_fo_300824

# Fráboðan um starvssetan av ES-ríkisborgarum hjá føroyskum undangóðkendum arbeiðsgevarum

**Hvat kann hetta umsóknarblað nýtast til?**
Tað kann verða nýtt til at boða frá starvssetan av ein arbeiðstakara, sum er ríkisborgari í einum limalandi í Evropasamveldinum, hjá føroyskum undangóðkendan arbeiðsgevara.

Fráboðanin snýr seg um eina serliga skipan av uppihaldsloyvi við atliti at arbeiði í Føroyum til ES-ríkisborgarar. Uppihaldsloyvið verður givið, tá ið arbeiðsloysið í Føroyum er undir 3,5%. Innan byggi- og verklagsøkið verða uppihaldsloyvi sum faklærd givin innan ávís handverk, um arbeiðsloysið har er undir 6%.

Fráboðanin um ítøkilig setanarviðurskiftir kann verða givin, um:

- Arbeiðsgevarin er undangóðkendur
- Setanin er fevnd av einum galdandi føroyskum sáttmála, sum er fevndur av undangóðkenningini hjá arbeiðsgevaranum
- Setanin er fyri í minsta lagi 30 tímar um vikuna

Til ber at seta serfrøðingar, granskarar, undirvísarar ella leiðandi starvsfólk eftir einstaklinga setanarsáttmálum, um tey ítøkiligu arbeiðini og starvsflokkarnir eru fevnd av undangóðkenningini hjá arbeiðsgevaranum.

Fyri at boða frá eini setan skulu bæði arbeiðsgevari og arbeiðstakari hjálpa til at útfylla hetta skjal, og arbeiðstakarin skal leggja tey neyðugu skjølini við.

**Soleiðis gert tú**

1. **Arbeiðsgevarin** (virkið) fyllir út **2. part** (pkt. 6-8) og skrivar undir í pkt. 10 (fylg leiðbeiningunum í skjalinum)

2. Tá ið arbeiðsgevarin hevur fylt út 2. part, sendir ella gevur hann arbeiðstakaranum alt skjalið

3. **Arbeiðstakarin** fyllir út 1. part (pkt. 1-3) av hesum skjalinum og skrivar undir pkt. 5 (fylg leiðbeiningunum í skjalinum)

4. Arbeiðstakarin leggur tey neyðugu skjølini við

5. Arbeiðstakarin sendir fráboðanina til Útlendingastovuna. Býr arbeiðstakarin uttanlands kann fráboðanin verða handað einari danskari umboðsstovu í landinum, hann er í.

**Hvørji skjøl verða løgd saman við fráboðanini?**
Arbeiðstakarin verður biðin um at leggja hesi skjøl við:

- Avrit av øllum síðum í passi sínum (íroknaðar allar tómar síður umframt for- og baksíðu á passinum
- Møgulig skjalprógv av útbúgvingum

**Skal arbeiðstakari hava onnur skjøl við, tá ið fráboðanin verður latin inn?**
Ja, arbeiðstakarin skal hava sítt upprunaliga pass við, so myndugleikarnir kunnu kanna samleikan hjá arbeiðstakaranum og gildið hjá passinum. Arbeiðstakarin skal eisini hava passið við, tá ið hann fer til myndugleikarnar eftir uppihaldsloyvinum.

**Nær kann arbeiðstakarin fara til arbeiðis?**
Arbeiðstakarin kann fara til arbeiðis í somu løtu, ein fráboðan er handað myndugleikunum.

Tað er ábyrgd arbeiðstakarans at skjalprógva, at fráboðanin er latin inn.

Um fráboðanin verður handað Fútanum í Føroyum ella Útlendingastovuni, kann arbeiðstakarin fáa eina kvittan um at hava latið fráboðanina inn.

Um arbeiðstakarin fer til arbeiðis, áðrenn setanin er fráboðað, arbeiðir hann/hon ólógliga, og bæði arbeiðstakari og arbeiðsgevari kunnu verða sektaðir við bót ella settir í fongsul.

**Útflýggjan av uppihaldsloyvi**
Um treytirnar er loknar, útflýggjar Útlendingastovan arbeiðstakaranum eitt uppihaldsloyvi. Er arbeiðstakarin í Føroyum, verður uppihaldsloyvið flýggjað út hjá Fútanum. Býr arbeiðstakarin í Danmark, kann uppihaldsloyvið eftir umbøn verða útflýggjað í deildum hjá Styrelsen for International Rekruttering og Integration. Býr arbeiðstakarin uttan fyri Danmark, ber til at fara eftir uppihaldsloyvinum hjá næstu donsku umboðsstovuni.

**Uppihaldsloyvi til fólk í familjuni**
Hjúnafelagi hjá arbeiðstakara og ómyndug børn teirra kunnu søkja um uppihaldsloyvi í Føroyum við at útfylla umsóknarskjal SF1.

**Um tit vilja vitað meira**
Tit kunnu fáa fleiri upplýsingar um reglurnar fyri uppihaldsloyvi í Føroyum hjá ES-ríkisborgarum á www.utlendingastovan.fo. Her kunnu tit eisini fáa meira at vita um hvussu langa tíð, málsviðgerðin tekur. Um tit ivast, kunnu tit seta tykkum í samband við Útlendingastovuna og fáa vegleiðing um reglurnar. Tit finna upplýsingar um samband við okkum á www.utlendingastovan.fo.

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

| Til myndugleikarnar | |
|---|---|
| Tikið ímóti dagfesting | Tikið ímóti hevur (stempul og navn) |

## Fráboðan um starvssetan av ES-ríkisborgarum hjá føroyskum undangóðkendum arbeiðsgevarum

## PARTUR 1 – arbeiðstakarin fyllir út

### 1. Arbeiðstakari

FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM

| | |
|---|---|
| Eftirnavn | Møguligt eftirnavn fyrr |
| Fornavn/fornøvn | |
| Tjóðskapur | Føðiland |
| Føðingardagur (dagur, mánaður, ár) | Møguligt p-tal |

Hevur tú fyrr havt uppihaldsloyvi í Føroyum? ☐ Ja ☐ Nei

Um **ja**, verður tú biðin at skriva áður brúkta P-tal/PersonID/málsnr.

### 2. Upplýsingar um arbeiðstakara

FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM

Kyn ☐ Maður ☐ Kvinna

| | |
|---|---|
| Bústaður í heimlandinum (Gøta/vegur og nr.) | Postnr., býur/bygd og land |
| Bústaður í Føroyum (Gøta/vegur og nr.) | Postnr., býur/bygd og land |
| c/o (navn) | Telefonnr. |
| Fartelefon | Teldupostur |

### 3. Upplýsingar um útbúgving

FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM

Hevur tú útbúgving innan økið, tú skalt arbeiða í? ☐ Ja ☐ Nei

Um **ja**, verður tú biðin at upplýsa hvørja og leggja skjalprógv við um útbúgvingina.

## 4. Váttan og kunning - arbeiðstakari

**A. Váttan við trú og heiður, at eg havi givið rættar upplýsingar**
Eg vátti, at eg havi givið rættar upplýsingar undir 1. parti (pkt. 1 – 3) í hesi fráboðan. Um tað seinni vísir seg, at upplýsingarnar ikki eru rættar, kann tað hava hesar fylgir:

- Uppihaldsloyvi hjá mær kann verða tikið
- Eg kann verða revsaður við bót ella fongsli í upp til 4 mánaðir
- Eg kann verða dømdur at gjalda fyri útreiðslurnar, sum donsku og føroysku myndugleikarnir hava havt av skeivu upplýsingunum

**B. Kunning um, at arbeiðstakari kann verða revsaður, um hann arbeiðir ólógliga**
Um tú sum útlendskur arbeiðstakari arbeiðir ólógliga í Føroyum, tvs. uttan neyðug loyvi, kanst tú verða revsaður við bót ella fongsli í upp til 6 mánaðir (§ 59 í fyriskipan nr. 182 frá 22. mars 2001 um gildiskomu av útlendingalógini fyri Føroyar).

**C. Kunning um viðgerð av persónsupplýsingum**
Útlendingastovan hevur skyldu til at upplýsa teg um, hvussu vit viðgera tínar upplýsingar og hvørji rættindi, tú hevur í mun til viðgerð okkara av tínum upplýsingum..

**Ábyrgd av dátum**
Útlendingastovan hevur dátuábyrgd av viðgerðini av teimum persónsupplýsingum, sum verða fingnar um teg í hesum fráboðanarblaði og upplýsingar, sum verða fingnar um teg í sambandi við viðgerðina av málinum. Tú kanst seta teg í samband við okkum við at skriva til henda bústað, Útlendingastovan, Skálatrøð 20, Postboks 264, 100 Tórshavn, ella umvegis okkara teldupost.

**Ráðgevin í dátuvernd (DPO)**
Tú kanst seta teg í samband við ráðgeva okkara í dátuvernd við at skriva til adressuna omanfyri (Att.: Ráðgevin í dátuvernd). Tú kanst lesa meira um Útlendingastovuna sum dátuábyrgdara og um okkara ráðgeva av dátuvernd á www.utlendingastovan.fo/fo(um-okkum/datavernd.

**Endamál og rættarstøði**
Persónsupplýsingarnar, tú gevur Útlendingastovuni, verða savnaðar at brúka til:

- viðgerð av fráboðan tínari um uppihald og arbeiði í Føroyum
- møguligar seinni umsóknir um framleingjan ella nýtt uppihald og/ella arbeiði í Føroyum
- eftirlit við treytunum fyri uppihaldi tínum og/ella arbeiði í Føroyum

**Rættarstøðið undir viðgerðini av tínum persónsupplýsingum er:**

- Anordning nr. 182 fra 22. marts 2001 om ikrafttræden for Færøerne af udlændingeloven (Útlendingalógin), serliga kapittul 1 um komu og uppihald her í landinum.
- Lov nr. 462 fra 17. juni 2008 for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse (Skipan fyri ES ríkisborgarar).
- Grein 8, stk. 1, nr. 3, í dátuverndarlógini um rættarliga skyldu, sum liggur á tí við ábyrgd av dátum, og grein 8, stk. 1, nr. 5, um almenna myndugleikan, Útlendingastovan útinnir sambært útlendingalógini.
- Grein 12, stk. 7, í dátuverndarlógini, um neyðuga viðgerð fyri, at rættarkrøv skipast, gerast galdandi ella verjast.
- Grein 13 í dátuverndlógini um, at fyrisitingin bara kann viðgera upplýsingar um revsiverd viðurskifti, um tað er neyðugt fyri, at myndugleikarnir kunnu røkja sínar uppgávur.

Upplýsingarnar, sum tú gevur og hevur givið í sambandi við fráboðan tína, fara at verða skrásettar hjá útlendingamyndugleikanum. Tað sama er galdandi fyri upplýsingar, sum tú seinni letur í sambandi við umsóknir um framleingjan ella nýtt uppihald og/ella arbeiði í Føroyum.

Onkrar av tínum upplýsingum fara at verða skrásettar hjá teimum føroysku myndugleikunum. Í summum førum fer tað at verða gjørt undir viðgerðini av málinum, og í øðrum førum verður tað ikki fyrr enn, tá ið tú býrt í Føroyum.

**Vit viðgera hesi sløg av persónsupplýsingum um teg:**

- Vanligar upplýsingar t.d. um arbeiði, útbúgving, familju og búskap og revsiverd viðurskifti, og
- Viðkvæmar upplýsingar, t.d. um heilsuna.

**Vit kunnu senda persónsupplýsingar um teg til hesar móttakarar:**
Útlendingastovan kann geva upplýsingar víðari til tína tilvísing (t.d. arbeiðsgevara, útbúgvingarstovn, vert ella skyldfólk), løgregluna, kommunurnar, tær donsku fregnartænasturnar, ákærumyndugleikan, Udlændingenævnet, donsku útlendingamyndugleikarnar, Fólkatingið og Udenrigsministeriet.

Útlendingastovan sendir eisini í einstøkum førum upplýsingar víðari til aðrar almennar myndugleikar, privatar felagsskapir, útlendsk feløg, og myndugleikar, tá ið tað er neyðugt, fyri at røkja okkara uppgávur.

Ein partur av viðgerðini av persónupplýsingum inniber, at Útlendingastovan letur øðrum myndugleikum, bæði í Føroyum og í Danmark, persónupplýsingar. Hetta fer fram, tá ið tað er neyðugt til tess at røkja uppgávurnar hjá Útlendingastovuni sambært galdandi lóg. Í ávísum førum hevur Útlendingastovan eisini skyldu at lata núverandi og fyrrverandi arbeiðsgevarum persónupplýsingar. Hetta er t.d. galdandi, um ein arbeiðstakari ikki longur hevur uppihaldsloyvi, og tískil ikki hevur rætt til at arbeiða í Føroyum. Í førum, har Útlendingastovan letur upplýsingar umvegis teldupost, verða upplýsingarnar latnar í samsvari við til galdandi leiðreglur um brongling, sum Dáturáðið hevur ásett.

**Hvaðani koma upplýsingarnar, vit viðgera um teg?**
Upplýsingarnar, ið Útlendingastovan viðger um teg, stava frá hesum umsóknarblaði. Vit viðgera eisini upplýsingar, sum tú seinni gevur málinum.

**Harumframt fara vit at viðgera upplýsingar, sum stava frá:**
- møguligum øðrum málum hjá Útlendingastovuni,
- leitan í skrásetingum
- øðrum myndugleikum, t.d. donsku útlendingamyndugleikunum,
- triðjaparti ella tilvísing, t.d. vert í sambandi við au pair ella praktikk, arbeiðsgevara ella lestrarstað,
- tí fólkinum, sum møguliga søkir um uppihaldsloyvi við støði í tínum uppihaldsloyvi, umframt onnur mál viðkomandi hevur hjá hjá SIRI

**Varðveiting av upplýsingum**
Útlendingastovan varðveitir tínar upplýsingar so leingi, tað er neyðugt fyri at kunna røkja okkara uppgávur í mun til at gera av eitt rættarkrav/gera eitt rættarkrav galdandi ella verja eitt rættarkrav um at vera í Føroyum.

Í einum útlendingamáli kunnu upplýsingar verða varðveittir til útlendingamyndugleikarnar at brúka til seinni málsviðgerðir. Tað vil siga, at upplýsingarnar kunnu verða partur av framtíðarmálum, t.d. mál um framleingjan, innkalling, eftirlit, frátøku, varandi uppihaldsloyvi, ríkisborgaraskap og møgulig mál hjá familju tíni.

Í roynd og veru merkir tað, at Útlendingastovan varðveitir tínar upplýsingar eitt lívsskeið – t.v.s. alt lívið. Grundleggjandi upplýsingarnar um títt uppihald í Føroyum, t.d. nær tú hevur fingið uppihaldsloyvi, grundarlagið fyri tínum uppihaldi í landinum og upplýsingar um aðrar avgerðir, sum Útlendingastovan tekur viðvíkjandi tínum uppihaldi, verða ikki koyrdar burtur.

At enda skulu vit nevna, at upplýsingarnar verða flýggjaðar Tjóðskjalasavninum sambært reglunum í føroysku lóggávuni um skjalasøvn.

**Rættindi**
Eftir fyriskipanini um dátuvernd hevur tú eina røð av rættindum í mun til, hvussu vit fara við upplýsingunum um teg:

*Rætt til at fáa at vita, hvørjar upplýsingar um teg, vit viðgera*
Tú kanst biða um innlit í, t.v.s. fáa at vita, hvørjar upplýsingar um teg, vit viðgera. Um tú biður um innlit í upplýsingarnar um teg, verður umsókn tín viðgjørd eftir reglunum í fyriskipanunum um vernd av dátum. Eru eisini aðrar reglur, sum geva tær betri rætt, fara vit eisini at viðgera umsókn tína um innlit eftir teimum reglunum, t.d. reglur í fyrisitingarlógini um skjalainnlit.

*Rætt til at rætta og strika upplýsingar*
Tú kanst biða um at sleppa at rætta upplýsingar um teg, sum tú heldur, ikki eru rættir. Í serligum førum hevur tú eisini rætt til at sleppa at strika upplýsingar um teg. Upplýsingar verða tó sum heild bara koyrdar burtur, um tær ikki eru neyðugar við málsviðgerðina, tí at Útlendingastovan hevur skyldu at skriva upp og skráseta sambært løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, nr. 133, frá 10. juni 1993.

*Rætt til avmarking av viðgerð*
Tú hevur í ávísum føri rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at avmarkað viðgerðina, sleppa vit hereftir bara at viðgera upplýsingar – undantikið varðveitslu – við tínum samtykki ella við ætlan um, at rættarkrav kann setast, gerast galdandi ella verjast, ella fyri at verja eitt fólk ella týdningarmiklan samfelagsáhuga.

*Rætt til at mótmæla*
Í ávísum førum hevur tú rætt til at mótmæla okkara annars lógligu viðgerð av tínum persónsupplýsingum. Tað merkir, at tú møguliga kanst krevja, at upplýsingarnar verða strikaðar, rættaðar ella avmarkaðar.

Tú kanst lesa meira um tíni rættindi í vegleiðingini hjá Dátueftirlitinum um rættindini hjá teimum skrásettu, sum tú finnur á datatilsynet.dk. Ætlar tú at brúka tíni rættindi, kanst tú seta teg í samband við Útlendingastovuna.

**Kæra til Dátueftirlitið**
Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgdur við mátan, vit viðgera tínar persónupplýsingar. Tú finnur upplýsingar um samband við Dátueftirlitið á www.dat.fo.

**D. Eftirlit**
Mál títt kann verða tikið til nærri kanningar. Eftirlitið hevur til endamáls at kanna:

- um upplýsingarnar, tú hevur givið, eru rættar
- um tú heldur treytirnar fyri einum møguligum uppihalds- og/ella arbeiðsloyvi
- um tú uppiheldur teg og/ella arbeiðir í Føroyum uttan neyðug loyvi.

Eftirlitið kann verða gjørt við at venda sær til aðrar myndugleikar.

Tú kanst í sambandi við eftirlitið verða biðin um at senda fleiri upplýsingar.

## 6. Samtykki til, at Útlendingastovan kann skifta um upplýsingar í málinum við mína tilvísing og møguligan triðjapart

Útlendingastovan kann uttan títt samtykki skifta um upplýsingar um teg við tína tilvísing, tá ið tað er neyðugt fyri viðgerðina av tíni fráboðan ella við seinni eftirliti við tínum uppihaldi í Føroyum (t.d. fyri at Útlendingastovan kann kanna rættleikan av teimum upplýsingum, tú hevur givið í sambandi við fráboðanina, ella at tú framvegis lýkur treytirnar fyri tínum uppihaldsloyvi). Sí í tí sambandi part C, "Kunnan um viðgerð av persónupplýsingum" í 5. punkti "Fráboðan og upplýsing – arbeiðstakari".

Í ávísum føri kann tað lætta um viðgerðina av tínum máli, at Útlendingastovan eisini í víðari merking hevur møguleikar fyri at skifta um upplýsingar um tíni viðurskifti við tína tilvísing ella ein triðjapart (t.d. tá ið vit ikki fáa samband við teg). Um tú vilt, at Útlendingastovan sum heild skal kunna fáa og senda víðari upplýsingar um tíni viðurskifti til tilvísingina ella í hesum føri triðjapartin, skalt tú samtykkja tað niðanfyri.

Vilt tú ikki, at vit í hesum føri býta um upplýsingar, fara vit í staðin at fáa okkum upplýsingar hjá tær (arbeiðstakara) og lata vera við at senda upplýsingarnar víðari til tilvísingina ella triðjapartin. Hetta kann tó hava við sær, at viðgerðin verður longur.

Tú kanst altíð taka samtykki aftur. Ætlar tú at taka samtykki aftur, skalt tú geva okkum boð um tað. Tú finnur upplýsingar um samband við okkum á www.utlendingastovan.fo

☐ **(set kross)**

**Eg vátti, at Útlendingastovan kann skifta um upplýsingar um meg við mína tilvísing ella ein triðjapart í hesum førum, fyri at lætta um viðgerðina av hesari fráboðan.**

## 7. Undirskrift – arbeiðstakari

**Eg vátti við mínari undirskrift, at eg havi givið rættar upplýsingar í fráboðanarblaðið, og at eg havi lisið og góðtikið innihaldið og ummælið í 5. pkt, pørtunum A og B.**

**Eg vátti samstundis, at eg havi tikið støðu til 6. pkt. um samtykki at skifta um upplýsingar.**

| Dagfesting og stað | Undirskrift |
|---|---|
| | |

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

# Tilskilað myndugleikunum

## A. Viðmerkingar og átekningar um avgreiðslu

☐ Nøvn og upplýsingar í passinum samsvara við vísta samleikaprógv

Viðlagt verður:

☐ Avrit av passi

☐ Skjalprógv um útbúgving

☐ Annað

Boða Landsfólkayvirlitinum (dagfesting)

Viðmerkingar

**MINST EISINI TIL AT ÚTFYLLA NAVN OG DAGFESTING Á SÍÐU 2 FYRI AT HAVA TIKIÐ ÍMÓTI**

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

## PARTUR 2 - arbeiðsgevari (virkið) fyllir út

### 8. Arbeiðstakari

FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM

Eftirnavn

Fornavn/fornøvn

Føðingardagur (dagur, mánaður, ár)

### 9. Upplýsingar um arbeiðsgevara (virkið)

FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM

Arbejdsgevari

| | |
|---|---|
| V-tal: | Mál nr., undangóðkenning: |
| Bústaður (Gøta/vegur og nr.) | Postnr. og býur/bygd |

Kontaktpersónur/umboð

| | |
|---|---|
| Telefonnr. | Teldupostur |

### 10. Upplýsingar um setanarviðurskifti

FYLL ÚT VIÐ BLOKKBÓKSTAVUM

Hvat er starvsheitið á arbeiðstakaranum?

Hvørji arbeiði skal arbeiðstakarin røkja?

| | |
|---|---|
| Nær settur í starv (dagur, mánaður, ár) | Arbeiðstíð um vikuna |

Er setanin tíðaravmarkað? ☐ Ja ☐ Nej

Um **ja**, verður tú biðin um at upplýsa nær (dagur, mánaður, ár)

Er setanin treytað av, at virkið er undangóðkent? ☐ Ja ☐ Nej

### 11. Váttan og kunning - arbeiðsgevarin (virkið)

**A. Váttan við trú og heiður um, at eg havi givið rættar upplýsingar**
Eg vátti við trú og heiður, at eg havi givið rættar upplýsingar undir 2. parti (pkt. 8-10) av hesi fráboðan.

Um tað seinni vísir seg, at upplýsingarnar ikki vóru rættar, kann tað fáa hesar fylgjur:
- Eg kann verða revsað/ur við bót ella fongsli í upp til 4 mánaðir
- Eg kann verða dømd/ur at endurgjalda útreiðslurnar, sum donsku og føroysku myndugleikarnir hava havt orsakað teimum skeivu upplýsingunum.

**B. Váttan um lønar- setanviðurskifti**
Eg vátti, at lønar- og setanarviðurskiftini eru vanlig arbeiðsviðurskiftir eftir føroyskum viðurskiftum.

Eg vátti harafturat, at hesir upplýsingar hoyra upp í setanaravtaluna ella setanartilboðið:
- Navn og bústaður hjá arbeiðsgevara og arbeiðstakara.
- Hvar arbeiðsplássið er ella, um einki fast arbeiðsstað ella eitt stað er, har meginparturin av arbeiðnum verður gjørt, upplýsingar um, at arbeiðstakarin arbeiðir á ymsum støðum og um høvuðssæti ella bústað hjá arbeiðsgevaranum.
- Lýsing av arbeiðinum ella tilskilan til arbeiði, heiti, starv ella slag av arbeiði hjá arbeiðstakara.
- Nær setanin byrjar.
- Hvussu leingi starvstíðin væntandi verður, um talan ikki er um tíðarbundið starv.
- Rættindi løntakarans, tá ið ræður um feriu, og um løn verður goldin í feriuni.

- Hvussu long uppsagnarávaring hjá løntakara og arbeiðsgevara er ella reglurnar um hetta.
- Galdandi ella avtalaða lønin, sum løntakarin hevur rætt til, tá ið starvstíðin byrjar, og viðbøtur og aðrir lønarpartar, sum ikki eru fevnd av lønini t.d. eftirlønargjald og møguliga kostur og innivist. Harafturat skal verða upplýst um, nær lønin verður goldin.
- Vanliga arbeiðstíðin hvønn dag ella um vikuna.
- Hvørjir sáttmálar ella avtalur eru um arbeiðsviðskifti. Um talan er um sáttmálar ella avtalur gjørdir við partar uttan fyri virkið, skal eisini upplýsast, hvørjir hesir partar eru.

**C. Váttan við trú og heiður um at halda lógina um arbeiðsumhvørvi við setan av fólki undir 18 ár**
Eg vátti við trú og heiður, at eg sum arbeiðsgevari fylgi lógini um arbeiðsumhvørvi.

**D. Kunning um, at arbeiðsgevarin kann verða revsaður, um arbeiðstakarin arbeiðir ólógliga**
Um ein útlendskur arbeiðstakari arbeiðir ólógliga í Føroyum, t.v.s. uttan neyðug loyvi ella í stríð við settu treytirnar fyri loyvinum, kann arbeiðsgevarin verða revsaður við bót ella fongsli í upp til 1 ár.

**E. Kunning um viðgerð av persónsupplýsingum um umboðið**
Útlendingastovan hevur skyldu at upplýsa teg um, hvussu vit viðgera tínar upplýsingar (tá ið tú ert umboð ella einsamallur eigur virkið), og hvørji rættindi tú hevur í mun til okkara viðgerð av tínum upplýsingum.

**Ábyrgd av dátum**
Útlendingastovan hevur ábyrgd av dátum og viðgerðini av persónupplýsingunum, sum koma við hesum fráboðanarblaðið og upplýsingum, sum komnar eru um teg í sambandi við viðgerðina av hesum máli. Tú kanst seta teg í samband við okkum við at skriva til henda bústað, Útlendingastovan, Skálatrøð 20, Postboks 264, 100 Tórshavn, ella umvegis okkara teldupost.

**Ráðgevin í dátuvernd (DPO)**
Tú kanst seta teg í samband við ráðgeva okkara í dátuvernd við at skriva til adressuna omanfyri (Att.: Ráðgevin í dátuvernd). Tú kanst lesa meira um Útlendingastovuna sum dátuábyrgdara og um okkara ráðgeva av dátuvernd á www.utlendingastovan.fo/fo/um-okkum.

**Endamál og rættarstøði**
Persónsupplýsingarnar, tú gevur Útlendingastovuni, verða savnaðir at brúka til:
- viðgerð av fráboðan tínari um uppihaldið og arbeiðið í Føroyum
- møguligar seinni umsóknir um leingjan ella nýtt uppihald og/ella arbeiði í Føroyum
- eftirlit við treytunum fyri uppihaldi tínum og/ella arbeiði í Føroyum

Rættarstøðið undir viðgerðini av tínum persónsupplýsingum er:
- Anordning nr. 182 fra 22. marts 2001 om ikrafttræden af udlændingeloven (Útlendingalógin), serliga kapittul 1 um komu og uppihald her í landinum.
- Lov for Færøerne om udlændinges adgang til opholdstilladelse med henblik på visse former for beskæftigelse.
- Grein 8, stk. 3, í dátuverndarlógini, um rættarliga skyldu, sum liggur á tí við ábyrgd av dátum, og grein 8, stk. 5, um almennu útinnanina, Útlendingastovan útinnir sambært útlendingalógini.
- Grein 12, stk. 7, um neyðuga viðgerð fyri, at rættarkrøv kunnu skipast, gerast galdandi ella verjast.
- Grein 13 í dátuverndarlógini um, at fyrisitingin einans kann viðgera upplýsingar um revsiverd viðurskifti, um tað er neyðugt fyri, at myndugleikarnir kunnu røkja sínar uppgávur.

Tað kann verða álagt tær at lata tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at kunna meta, um umsøkjarin kann fáa uppihaldsloyvi í Føroyum.

Upplýsingarnar, sum tú gevur og hevur givið í sambandi við fráboðan tína, fara at verða skrásettar hjá útlendingamyndugleikanum. Tað sama er galdandi fyri upplýsingar, sum tú seinni letur í sambandi við umsóknir um framleingjan ella nýtt uppihald og/ella arbeiði í Føroyum.

**Vit viðgera hesi sløg av persónupplýsingum um teg:**
- Vanligar persónupplýsingar, tað kunnu t.d. vera upplýsingar um navn títt, telefonnummar, bústað og upplýsingar um arbeiði títt á virkinum.

**Vit kunnu lata tínar persónupplýsingar víðari til hesar móttakarar**
Útlendingastovan kann í ávísum førum lata tínar upplýsingar til onnur, og vit lata upplýsingar víðari t.d. til Udlændingestyrelsen, Styrelsen for international rekruttering og Integration, Løgreregluna í Føroyum, donsku fregnartænasturnar, ákærumyndugleikan, Udlændinge og Integrationsministeriet, Udlændingestyrelsen, Folketinget og Udenrigsministeriet.

Tær verða latnar víðari, tá ið tað er neyðugt hjá Útlendingastovuni at taka sær av uppgávunum, undir hesum er eisini, at lóggávan krevur, at Útlendingastovan skal senda teir víðari.

**Hvaðani koma upplýsingarnar, vit viðgera um teg?**
Upplýsingarnar, ið Útlendingastovan viðgerð um teg, koma úr hesum fráboðanarblaði. Vit viðgera eisini upplýsingar, sum tú ella umsøkjari møguliga taka upp í málið seinni. Varðveiting av upplýsingum Útlendingastovan varðveitir tínar

upplýsingar so leingi, tað er neyðugt fyri at kunna røkja okkara uppgávur í mun til at gera av eitt rættarkrav/gera eitt rættarkrav galdandi ella verja eitt rættarkrav at vera í landinum. Í einum útlendingamáli kunnu upplýsingar verða varðveittir til útlendingamyndugleikarnar at brúka til seinni málsviðgerðir. Tað vil siga, at upplýsingarnar kunnu verða partur av framtíðarmálum, t.d. mál um framleingjan, innkalling, eftirlit, afturtøku, varandi uppihald og mál um ríkisborgaraskap. Í roynd og veru merkir tað, at Útlendingastovan varðveitir tínar upplýsingar eitt lívsskeið – t.v.s. alt lívið. At enda skulu vit nevna, at upplýsingarnar verða flýggjaðar Tjóðskjalasavninum eftir reglunum í føroysku lóggávuni um skjalasøvn.

**Rættindi**
Eftir fyriskipanini um dátuvernd hevur tú eina røð av rættindum í mun til, hvussu vit fara við upplýsingunum um teg:

*Rætt til at fáa at vita hvørjar upplýsingar um teg, vit viðgera*
Tú kanst biða um innlit í, t.v.s. fáa at vita hvørjar upplýsingar um teg, vit viðgera. Um tú biður um innlit í upplýsingarnar um teg, verður umsókn tín viðgjørd eftir reglunum í fyriskipanunum um vernd av dátum. Eru eisini aðrar reglur, sum geva tær betri rætt, fara vit eisini at viðgera umsókn tína um innlit eftir teimum reglunum, t.d. reglur í fyrisitingarlógini um skjalainnlit.

*Rætt til at rætta og strika upplýsingar*
Tú kanst biða um at sleppa at rætta upplýsingar um teg, sum tú heldur, ikki eru rættir. Í serligum førum hevur tú eisini rætt til at sleppa at strika upplýsingar um teg. Upplýsingar verða tó sum heild bara koyrdar burtur, um tær ikki eru neyðugar við málsviðgerðina, tí at Útlendingastovan hevur skyldu at skriva upp og skráseta sambært løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, nr. 133, frá 10. juni 1993.

*Rætt til avmarking av viðgerð*
Tú hevur í ávísum førum rætt til at fáa viðgerðina av persónupplýsingum tínum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at avmarka viðgerðina, kunnu vit hereftir bara viðgera upplýsingar – undantiknar varðveitslu – við tínum samtykki ella við ætlan um, at rættarkrav kann setast, gerast galdandi ella verjast, ella fyri at verja eitt fólk ella týdningarmikil samfelagsmál.

*Rætt til at mótmæla*
Í vissum førum hevur tú rætt til at mótmæla okkara annars lógligu viðgerð av tínum persónsupplýsingum. Tað merkir, at tú møguliga kanst krevja, at upplýsingarnar verða strikaðar, rættaðar ella avmarkaðar. Tú kanst lesa meira um tíni rættindi í vegleiðingini hjá Dátueftirlitinum um rættindini hjá teimum skrásettu, sum tú finnur á www.dat.fo.
Ætlar tú at brúka tíni rættindi, skalt tú seta teg í samband við Útlendingastovuna.

**Kæra til Dátueftirlitið**
Tú hevur rætt til at kæra til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgdur við mátan, vit viðgera tínar persónupplýsingar. Tú finnur upplýsingar um samband við Dátueftirlitið á www.dat.fo

**E. Eftirlit**
Útlendingastovan fer at kanna, um upplýsingar, tú gevur ella hevur givið í sambandi við tína umsókn, eru rættar. Tað kann verða bæði undir sjálvari viðgerðini av umsóknini og seinni, tá ið umsóknin kanska er játtað.

Eftirlitið kann verða gjørt við at venda sær til aðrar myndugleikar.

Tú kanst í sambandi við eftirlitið verða biðin um at senda fleiri upplýsingar.

## 12. Undirskrift – arbeiðsgevari

**Við mínari undirskrift vátti eg vegna virkið, nevnt omanfyri, at eg havi givið rættar upplýsingar í umsóknarblaðið, og at virkið hevur góðtikið innihaldið av váttanum í pkt. 11, partarnir A-C**

| Dagfesting og stað | Undirskrift |
|---|---|
| | |

## Hevur tú minst til alt?

Um fráboðanin er rætt útfylt, og neyðugu skjølini eru við, kann Útlendingastovan viðgera málið skjótt.

Tí er týdningarmikið, at tú – áðrenn fráboðanin verður latin inn – kannar, at oyðublaðið er rætt útfylt, og neyðugu skjølini eru løgd við.

Vit mæla til, at tú nýtir minnislistan niðanfyri, áðrenn fráboðanin verður latin inn.

ÚTLENDINGASTOVAN
IMMIGRATION OFFICE

## Minnislisti

**Áðrenn fráboðanin verður latin inn, er týdningarmikið, at arbeiðstakari hevur lagt hetta við (set kross):**

☐ Avrit av passi

☐ Møguliga skjalprógv av útbúgving

**Tað er eisini týdningarmikið, at arbeiðstakarin hevur**

☐ svarað øllum spurningum undir parti 1 (pkt. 1-3) og hevur

☐ skrivað undir og dagfest fráboðanina undir pkt. 5.

**At enda er tað týdningarmikið, at arbeiðsgevarin (virkið) hevur**

☐ svarað øllum spurningum undir parti 2 (pkt. 6-8) og hevur

☐ skrivað undir og dagfest fráboðanina undir pkt 10.

**Minst til, at arbeiðstakarin skal hava sítt uppruna pass við, um hann sjálvur kemur við fráboðanini.**

**Arbeiðstakarin skal eisini hava sítt pass við, tá ið hann kemur eftir einum møguligum uppihaldsloyvi.**